

## Domenech ræðist Føroyar

Í Fraklandi rokna tey flestu annars dystin í Føroyum sum ein walk-over hjá fronsku stjørnunum, sum ikki høvdu stórvegis trupulleikar á vøllinum, tá teir eftir ein heldur turbolentan flúgvitúr vóru komnir til oyggjar okkara. Men landsliðsvenjarin, Raymond Domenech, leggur áherslu á, at talan væl kann gerast um trupla uppgávu í august. - Tað er ein dystur, sum eg hugsi nógv um. Tað kann væl vera, at tit flenna, men eg hugsi um dystin móti Føroyum í august. Tað er ein dystur, har fleiri av okkara spælarum als ikki eru í venjing, so tað hevur stóran týdning, at vit longu nú savna tankarnar um uppgávuna, sigur Raymond Domenech við goal.com.

## Serena nýtti 9 matchbóltar

Sum væntað vann amerikanska Serena Williams seg víðari í næsta umfar í French Open í tennis. Men tað tók sína tíð hjá amerikonsku kvinnuni, sum er styrkismett sum nummar tvey, at vinna á kekkisu Klara Zakapalova. Zakapalova er styrkismett sum nummar 100 í heiminum, men tað tók Serenu Williams trý sett og níggju matchbóltar, áðren hon við settúrslitunum 6-4, 6-7, 6-4 hevði vunnið seg víðari í kappingini.

# EB/Streymur í steypafinaluni

**Tað verða EB/Streymur og B36, sum spæla steypafinaluna hjá unglingum um hálvaaðru viku. Hetta er greitt, eftir at EB/Streymur í gjárkvøldið í Runavík vann 4-2 í einum ikki sørt dramatiskum dysti ímóti NSÍ**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Unglingarnir hjá EB/Streymi vunnu í gjárkvøldið hálvfinaluna ímóti NSÍ og skulu um hálvaaðru viku spæla steypafinalu ímóti B36*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Undan hálvfinaluni var NSÍ favorittur, um roknast skuldi eftir úrslitunum higartil í landskappingini, tí har eru runavíkingar á odda, enntá við fullum stigatali, meðan EB/Streymur liggur í miðjuni við bara einum sigri og tveimum javnleikum sum fongi.

Men ein hálvfinala letur seg ikki altíð ávirka av, hvussu tað annars stendur til, og EB/Streymur kom væl frá byrjan og hevði yvirvág í fyrra hálvleiki. Stutt fyri hálvleik skoraði Ási Dam til 1-0, sum var einasta málið fyri steðgin, hóast bæði lið høvdu sínar møguleikar.

Í seinna hálvleiki byrjaði NSÍ sum eitt óløgi, spældi væl og legði stórt trýst á EB/Streym. Tað gekk heldur ikki so long tíð, so var NSÍ á odda. Fyrst javnaði Klæmint Olsen og síðani skoraði Andrias á Líknargøtu til 2-1, og eftir hetta kundi heimaliðið saktans fleiri ferðir økt um leiðsluna, tí nógvir kjansir vóru og NSÍ hevði eini 10-15 hornaspørk innan fyri eitt korter.

### Trý skjót mál

Ofta verður tosað um, at lið ikki kenna sína vitjunartíð, og tað fekk NSÍ eisini at sanna, tí ímóti endanum á dystinum fekk EB/Streymur fótin fyri seg, meðan alt skramblaði saman hjá vertunum. Tað byrjaði við, at EB/Streymur fekk eitt hornaspark, ið NSÍ-ararnir vóru so misnøgdir við, at mótmælini endaðu við, at ein av teimum mátti undir brúsuna undan hinum.

Ikki gjørdi tað støðuna frægari, at Hallur Fláaberg eftir júst hetta hornasparkið fekk javnað til 2-2. Hetta skyldaðist ikki minst, at NSÍ nú var langt frá at hava javnvág á liðnum – umframt sjálvandi at vera ein mann í minniluta.

Tað skuldi eisini gerast verri enn, tí innan fyri tríggjar minuttir fór EB/Streymur frá 2-2 upp á 4-2, sum gjørdist endaliga úrslitið. Andru Poulsen skoraði til 3-2 eftir enn eitt horna, og minuttin eftir økti Hanus Olsen til 4-2, tá hann bleiv púra leysur og lyfti upp um málmannin.

Sostatt hava unglingarnir hjá EB/Streymi spælt seg í finaluna um Thomas Dam Intersport-steypið, sum verður spælt á uttanveltaðum vølli mánadagin 8. juni. Mótstøðuliðið verður B36, sum fyri einari viku síðani tryggjaði sær finaluplássið við at vinna 1-0 á HB í einum so mikið jøvnum dysti, at hann ikki var avgjørdur fyrr enn eftir longda leiktíð.

# Kypros vann EM fyri smátjóðir

**Sunnudagin vann Kypros finaluumfari í EM-kappingini í flogbólti fyri smátjóðir. Annar av undanbólkunum í kappingini var spældur í Føroyum fyri einum ári síðani**

FLOGBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Dagarnir frá 16. til 18. mai í fjør vóru finir fyri tey flogbóltsáhugaðu, tí tá var føroyska kvinnulandsliðið eitt av fimm, ið dystaðust í øðrum av undanbólkunum í EM-kappingini fyri smátjóðir. Hini londini, ið vóru komin higar at spæla, vóru Luxembourg, Liechtenstein, Skotland og Írland.

Ikki færri enn 10 landsdystir vóru spældir hesar tríggjar dagarnar, og tað var um reppið, at føroyska kvinnulandsliðið megnaði at spæla seg víðari til endaspælið. Tá avtornaði, vann Luxembourg bólkin við fullum stigatali, men síðani komu Liechtenstein, Skotland og Føroyar á næstu plássunum – øll við sama stigatali.

Men av tí at styrkilutfallið ikki var Føroyum til fyrimun, gjørdist tað Liechtenstein, sum slapp við til endaspælið saman við Luxembourg. Somuleiðis var Liechtenstein vertur fyri endaspælinum, sum var í Schaan um vikuskiftið.

Har stóð á jøvnum í stigum millum Kypros og San Marino, ið komu úr hinum undanbólkinum, men Kypros hevði bæði betri settmun og styrkislutfall enn San Marino, og vann í kappingina. Luxembourg gjørdist nummar trý og Liechtenstein nummar fýra.



*Hóast San Marino vann á Kypros í EM-endaspælinum í flogbólti fyri smátjóðir um vikuskiftið, endaði Kypros við at vinna kappingina framman fyri júst San Marino. Luxembourg og Liechtenstein, ið komu úr undanbólkinum hjá Føroyum, gjørdust ávikavist nummar trý og fýra*

*Mynd: Michael Zanghellini*

## Skerdir argja-menn

**Janus Joensen og Høgni Joensen verða ikki við, tá AB hóskvøldið skal royna at vinna seg í steypafinaluna**

FÓTBÓLTUR

*Uni Holm Johannesen*

Heimasíðan hjá AB skrivar, at brøðurnir Janus Joensen og Høgni Joensen ikki verða við í hópinum hjá argjamonnum, tá seinna hálvfinalan í kappingini um Løgmanssteypið skal avgreiðast við Margáir í Streymnesi hóskvøldið. Teir eru báðir staddir uttanlands, og vóru heldur ikki við, tá AB vitjaði í Runavík.

Sunnudagin noyddist málverjin Heðin Stenberg av vøllinum, og í hansara stað er Tórður Thomsen leigaður frá NSÍ. Bróður Heðin Jónas Stenberg situr eisini í løtuni uttan fyri við brotnum óstbeini.

Fyrra hálvfinalan millum AB og EB/Streym endaði 1-1.

Hin hálvfinalan hóskvøldið stendur millum Víking og ÍF. Fyrri dysturin teirra millum endaði við 1-0 sigri til Víking, sum soleiðis er í góðari støðu undan hósdegnum.